# Ein túr út í rúmdina

Rúmdarferðir fyri vanlig fólk, hava verið gjørdar eina tíð nú. Amerikanska felagið »Space Adventures« hevur bjóðað fram slíkar ferðir, og fimm hava verið hagartil. Fyri at sleppa við, var kravt eitt hálvt árs venjingarskeið og túrurin kostaði meir enn 10 milliónir dollarar. Eitt nýtt átak hjá »The Spaceship Company« er bjóða fólki hendan forkunnuga túrin fyri ein væl rímiligari prís. Rúmdarferjan verður lyft upp við flogførum, og í 17 kilometra hædd verða motorarnir á rúmdarferjuni tendraðir, og eftir eina 90 sekundir langa ferðøkingartíð ber til at njóta vektleysa umhvørvið. Men einans í nakrar minuttir, so fer ferjan á kós móti jørðini. Ein av stóru mununum millum nýggja og gamla tilboðið er, at heilsukrøvini eru munandi batnaði, so um 80 prosent hava heilsuna til túrin, sum nú einans krevur eina viku av venjingartíð. Fyrstu plássini, ið longu eru seld, kostaðu um 200.000 dollarar. Men ætlanin er, at í framtíðini kemur kostnaðurin at liggja um 20.000 dollarar, tað vil siga, um um 100.000 krónur.





*Jógvan Fríðriksson og Theodor E. D. Olsen gruna um støðuna og næsta kastið*



*Tey prátaðu óført meðan kúlurnar ruku avstað við jøvnum millumbili*



*Tann rætta kúlan skuldi sjálvandi eisini finnast*

# Bovlandi prestar

**Fríggjadagin skrivaði Sosialurin, at prestarnir í Føroyum høvdu evnisdag, og at á skránni var millum annað eisini bovling. Vit vóru á staðnum og fingu nakrar myndir av teimum**

PRESTALÍV

*Orð og myndir: Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tá talan er um prestar, síggja vit vanliga fyri okkum ein mann ella eina kvinnu í prestakjóla, standandi í prædikustólinum ella við altarið.

Men tað er í øllum førum ikki tað, ið var at síggja í bovlinghøllini á Hálsi fríggjakvøldið klokkan 18, tá prestar og umsitingin hjá fólkakirkjuni við makum fóru at bovla.

Um tú ikki visti betri, hevði tú ikki fangað, at talan var um allar prestarnar í Føroyum, sum mannaðu banarnar í bovlinghøllini hetta kvøldið.

Lagið var gott, og nógv varð flent og prátað, meðan kúlurnar vóru sendar avstað mótvegis keylunum í hinum endanum.

## Eru eisini vanlig menniskju

Fríggjadagin høvdu prestarnir í Føroyum evnisdag, sum byrjaði við andakt í Havnar Kirkju. Síðan varð hildið fram á ovastu hædd í Hotel Hafnia, har fyrilestrar vórðu hildnir. Seinni á kvøldinum var so farið út at eta og at bovla.

Jógvar Fríðriksson, bispur, segði við Sosialin fríggjadagin, at hann sá einki skeivt í at teir fara at bovla, tí at teir eru menniskju sum øll onnur. Og tað var júst tað, sum sást aftur hetta fríggjakvøldið í bovlinghøllini, nevnliga prestar og bispur í vanligum klæðum, sum fólk flest fara í, um tey skulu út at bovla og eta eitt fríggjakvøld.